Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Sámal Petur í Grund, løgtingsmaður.

Svarari: Bárður á Steig Nielsen, landsstýrismaður í uttanríkis- og fiskivinnumálum

Evni: At strika ásetingar um fiskidagar fyri smærri útróðrarbátar undir Føroyum.

Spurningar:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at taka stig til, at strika allar ásetingar um fiskidagar fyri smærri útróðrarbátar, sum fiska undir Føroyum?
2. Metir landsstýrismaðurin, at tað er fakliga og vinnuliga rímiligt, at leggja smærri útróðrarbátar undir somu fiskidagaskipan, sum størri skip, hóast teir longu eru avmarkaðir av veðri og streymi?
3. Hvørjar fakligar grundgevingar eru fyri at halda fast í fiskidagaskipanini fyri smærri útróðrarbátar, tá teirra fiskiskapur er staðbundin, lítil í vavi og ikki samanberiligur við størri fiskiskip?
4. Hevur landsstýrismaðurin latið gera nakrar kanningar av, hvørja ávirkan tað hevði á stovnar og heildarveiðu, um smærri útróðrarbátar undir Føroyum vórðu frígivnir frá fiskidagaskipanini?
5. Um landsstýrismaðurin ikki ætlar at strika fiskidagarnar: hvørjar tillagingar, undantøk ella nýggjar skipanir eru so ætlaðar at tryggja, at smærri útróðrarbátar ikki verða óneyðuga avmarkaðir av politiskt ásettum døgum, umframt teimum náttúrligu avmarkingunum, sum teir longu eru bundnir av?

Viðmerkingar:

Útróðurin hevur í øldir verið ein grundarsteinur í føroyska samfelagnum – bæði sum inntøkukelda og sum ein týðandi partur av okkara mentan og samleika.

Smærri útróðrarbátar, sum rógva út undir Føroyum, eru bundnir av veðri, streymi og náttúrligum umstøðum, sum longu í verki avmarka teirra virksemi munandi meira enn hjá størri fiskiskipum.

Hóast hetta eru hesir bátar lagdir undir somu fiskidagaskipan sum stór og miðalstór fiskiskip.

Hetta kann tykjast, sum ein óneyðug og órímilig byrða fyri útróðrarmenn, serliga limirnar í Meginfelag Útróðramanna, sum hava staðbundnan og avmarkaðan fiskiskap, ið ikki á nakran hátt hava sama árin á stovnarnar sum størri skip sum fiska undir Føroyum eins og at veður og streymur eiga at verða einasta avmarking fyri útróðurin – og ikki politiskt ásettar dagar, kvotur ella aðrar reguleringar.

Útróðrarmenn eiga at fáa ta virðing, teir hava uppiborið og møguleika at rógva út, tá náttúran loyvir tí, tí hetta er bæði vinnuliga, skilagott og mentanarliga rætt.

Fyri at fáa greiðu á hesum viðurskiftum verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 22. juni 2026

Sámal Petur í Grund